# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Diamantbrúdleyp

## Ein heilsan til diamantbrúðarparið Henny og Mogens Petersen í Fuglafirði



Tað glógvar ein diamantur uppi á Høvdini við Tróndarbrekku í hesum døgum í Fuglafirði. Tann 31. mai í ár kunnu hjúnini Henny og Mogens Petersen úr Fuglafirði halda diamantbrúdleyp. Í hesum skyggingum renna minnir fram, har hetta snøgga par kann líta aftur um bak og sóla sær í hesum frumljósi. Ja, so litrík tey eru, tá ið tey flyta seg um tún og stræti. Henny er kanska ikki so prátingarsom sum gemalurin, men tað nýtist henni ikki, tá ið Mogens er orðførarin og dámar væl at práta, men eg ivist onga løtu í, tá ið tey koma at húsum, at hon hevur onkra viðmerking til sína betri helvt at biðja Mogens gera skjótari av og stytta um samrøðuna. Hugsi, at Mogens lovar, at hetta skal hann minnast til. Um so verður, verður tað synd í okkum, sum lýða á, at missa eitt ljóð í bygdini, sum vit hava lýtt á í meira enn eina hálva øld. Hetta er á alfaravegi, og fá eru tey í dag, ið flyta seg á hesum gøtum á apostlunum, men tey flestu fúka av stað í skyggjandi dollargrinum, og ikki fæst orð á nakran teirra. Nei, so leingi tit orka, so lat okkum skifta orð saman undir fríum lofti. Hetta er bót fyri sál og likam.

Mogens er skræddaralærdur, og Henny hevur verið húsmóðir. Ja, hetta ljóðar so inniligt, orðið húsmóðir. Hetta var lagið á Bakkanum øll míni barna – og ungdómsár, og hetta var lívsrytman um landið alt. Hon var von og tekkilig í sínum ungu árum, og liggur enn hesin dámur yvir henni. Ein kærleiksfullur, hóvsamur dámur, sum bert sæst hjá føroyskum bygdakonum. Tær hava tað bláa havið í sínum holdi og eygum, tey hábærsligu fjøllini, fjallagreinirnar og tær grønu líðirnar hava givið teimum ein høvuðburð, sum vit menn elska, og kanska er tað svá, at hetta sæst best hjá kvinnum, sum búgva í Fuglafirði. Fjøllini eru so há, tí mugu tær fatta sær á, fyri at fáa fatur á ljósinum, sum dartar á fjallarøðini kring staðin. Enn síggjast Henny og Mogens fara eftir vegnum so nýforelskað . Eitt ævintýr í sekstiára poetiskum stíli, sum nú skyggir í einum diamanti.

Havi eina hugmynd av Mogensi í kjallaranum, har hann seldi klæði til bæði menn og konufólk og sjálvandi seymaði klæði upp á fólkið. Úrvalið var ikki stórt, men tað var gott. Hann kendi sálirnar á Bakkanum og í Fuglafirði sum heild og visti, hvat hvørjum tørvaði. Hann var skjótur í vendingini við senturmeturmálinum hangandi um háls og herðar og prátaði um sang og sjónleik. Ja, eg havi í mong ár sungið saman við Mogensi í Fuglafjarðar sangkóri, har hann var tenorur. Her fóru mangar gleðisløtur av stað, tá ið Herluf sveiggjaði sínum ørmum. Einki var sum jólakvøld í Fuglafjarðar kirkju, tá ið øll í sangkórinum komu í skreyt og skrúð innar í kór og vístu seg frá sínum bestu síðum undir glampandi kertum og skyggjandi perlum um háls og í oyralippum. Hetta vóru kvinnurnar, sum góvu okkum hetta endurskinið av einum ævinnar guddómsljósi. Menninir í hvítari flippu og manskettknappum, sum fjalnir stungu kríllin undan jakkaermuni og vildu vera við í hesi diamantglæmu, sum stóð livandi ljós um alt kirkljuhválvið. Tá var Himmalin á Guðs grønu jørð. Hetta var hæddarpunktið í bygd okkara í mong Harrans ár, og teimum, sum untust at verða við í hesi søk, er hetta tylvtir av tinnuljósi, sum enn livir í minninum. Soleiðis stóð Mogens og segði sína søgu, meðan hann snøggliga fekk tær einar buksur, skjúrtu, hosur ella jakka. Hann er orðaríkur, góður eygleiðari og dugir væl at siga frá. Hann spældi eisini sjónleik. Hugsi, at hann spældi við í Systrunum á Kinn, sum varð framførdur í 1960. Hetta er so ein partur av tí mentanarliga rákinum.

Henny er av ættað av Glyvrum. Mamman æt Mathilda og var úr Hvalsrætt á Glyvrum. Faðirin var Martin og var ættaður av Sýnini, somuleiðis á Glyvrum. Mathilda og Martin fingu 13 børn, og Henny var nr. 5 í røðini. Tey festu búgv inni á Hvalsrætt. Henny kom til Fuglafjarðar at tæna í 1944 hjá Gamla Sámal Peturi.

Pápi Mogens var Daniel Jacob Petersen, Dánjal á Bakkanum, giftist við Kristinu, sum var ættað av Kvilt í Sandvík og kallað Suðuroyar Kristina. Tey fingu 11 børn og Mogens var næst yngstur. Daniel Jacob var sonur Sámal Petur Petersen, undir Reyni, ættaður úr Funningi. Hann giftist við Kristionnu, sum var ættað úr Garðshorni í Oyndarfirði. Sámal Petur hevði handilsloyvi og handlaði inni í Hálvmørk. Tey fluttu til Fuglafjarðar í 1883, og tók hann sítt gamla yrki uppaftur sum skósmiður. Hann var seinni róptur Gamli Skósi.

Henny og Mogens fingu 4 børn. Martin, f. 1951, giftist til Danmarkar og býr í Bagsværd - 2 synir, Marner, f. 1954, giftist til Klaksvíkar - drong og gentu, Mathilda, f. 1958, giftist til Klaksvíkar- 2 synir, og Magnus, f. 1965, býr í Randers – gentu og drong. Sostatt eiga Henny og Mogens 8 ommu- og abbabørn.

Nú eru so liðin 60, ár síðani Henny og Mogens søgdu ja hvørt til annað fyri Guði og monnum. Tey giftust í Klaksvík 31. mai 1950, og hetta ja er nú 60 ára gamalt, men hugsandi er, at tað var sum í gjár, at tey hugdu djúpt inn í eyguni hvørt á øðrum. Her hava tey skjótt verið í eitt heilt lív saman í gleðisstundum og sorgardøgum, men væl hava tey dugað at nomið við teir træðrirnar, sum hava givið lívinum tað innihald og lívsljós, sum skal til fyri at hava eitt gott stev í lívsins ávikum, bæði í viðgangi og mótgangi.

Hjartaliga til lukku við diamantbrúdleypinum.

**Frits**

### Dagurin

28. mai. Vilhjálmur, deyður í 812. Hertogi í Gascogne í Fraklandi. Hann var ein av kempunum hjá Karlamagnusi keisara. Tað er um hann, at Sjóvarbóndin yrkti kvæðið Viljorm Kornus. Hann fór í kleystrið inn at bøta sínar syndir. Seinni legði hann út aftur í herstríð, men halgisøgan sigur, at hann á gamalsaldri aftur fór í kleystrið, sum hann sjálvur hevði grundað. Upprunaliga týskt navn, vilji og hjálmur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæri maður, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Alf J. Kristoffersen,**
Bakari

ættaður úr Søllerød, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósmorgunin 27. mai 84 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin 29. mai kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni 30. mai kl. 14.00

***Familjurnar vegna***

***Sonja***

Tey ið ynskja at minnast Alf, kunnu geva SOS Børnebyerne eina gávu, konta nr. 9181-09854411

TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróðir okkara

**Eyðfinnur Olsen**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar og gávur til Krabbameinsfelagið.

***Fyri tey avvarðandi***

***Systkini***